## DAGSINS MEINING

### Ferðusluóhapp kastar skugga á flokk!

Tann eini trupulleikin í Tjóðveldisflokkinum er ikki loystur, tá ein av fremstu monnunum í flokkinum, Karsten Hansen, kemur í annan trupulleika, sum einki hevur við politikk at gera, men sum óivað fer at kasta ein skugga inn í politiska lívið í Tjóðveldisflokkinum og kanska eisini á Løgtingi.

Øll kunnu koma í eitt ferðsluóhapp, lítið ella stórt. Er tað álvarsamt, verður politiið boðsent. Politiið ger eina frágreiðing og staðfest verður, hvør bilførarin hevur skyldina. Er talan um eitt álvarsamt brot á ferðslulógina, kann viðkomandi, sum hevur skyldina, verða ákærdur og seinri dømdur.

Men í nógvum førum eru óhappini smá. Politiið verður ikki boðsent, og so er spurningurin, um skaðin er so stórur, at hann verður meldaður til annað tryggingarfelagið, ella annar av pørtunum átekur sær at gjalda fyri skaðan, so skaðaelvarin ikki missir avsláttur í tryggingargjaldinum.

Tað kann hugsast, at Karsten Hansen og Olaf Olsen, sum varð ákoyrdur, hava hugsað soleiðis, tí skaðin tóktist kanska ikki vera so stórur við fyrsta eygnakast. Men tá Sjónvarpið mánakvøldið vísti myndir av bilinum, sá skaðin ikki út til at vera so heilt lítil kortini og kostar óivað nakrar túsund krónur at umvæla.

Teir avtala, sambært Sjónvarpinum, at "orðna tað á staðnum", sum tikið verður til.

Men tað er bara eitt stórt MEN. Tann eini bilførarin breyt ferðslulógina, treytaðu víkislyldina, tá tað hendir.

Vit hava fleiri dømi tey seinastu árini, at fólk hava brotið treytaleysu víkiskyldina - tað merkir t.d. at tey hava koyrt fram um hávatenn - og tey eru ákærd og eru kanska dømd at gjalda eina bót, ella tað, sum verri er. T.d. var ein av lógarsmiðum landsins, løgtingsmaðurin Kári P. Højgaard, fyri einum óhappi fyri einum ári síðani ella so. Hann breyt ferðslulógina, og politiska órinið varð tikið frá honum, so hann kundi dømast.

Bilførarin, sum síðsta fríggjakvøld breyt ferðslulógina, Karsten Hansen, er eisini lógarsmiður, ella løgtingsmaður, og harafturat er hann politistur og fyrrverandi sýslumaður - lógarinnar verji. Tá Sjónvarpið leggur spurningin fyri hann, viðgongur hann, at hann átti at havt meldað. Tað sama heldur støðleiðarin í Havn, Jón Klein Olsen, sum ígjár segði við Útvarpið, at Karsten Hansen átti at havt meldað hendingina. Hann gjørdi tað ikki tá, men hann hevur kanska gjørt tað nú. Eitt sindur "ullint".

Formaðurin í Tjóðveldisflokkinum sigur, at hetta er eitt mál millum Karsten Hansen og politiið. Sjálvandi er tað tað, men við tað, at maðurin ikki meldaði hendingina til politiið, fer hetta málið óivað at kasta skuggar langt inn í Tjóðveldisflokkin, sum í løtuni er í eini álvarsligari trúvirðiskreppu!

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Tey ungu – tey gloymdu

**Tórfinn Smith**
*Býráðslimur og valevni til býráðsvalið*




Í samfelagskjakinum verður sum oftast fokuserað á einstøk mál. Mál, sum eru uppi í tíðini, - sum eru INN.

Barnaansingin hevur verið serliga INN seinastu fýra árini. Tað trongdi eisini til. Barnaansingartørvurin eru so at siga nøktaður.

Nú skriva politikararnir, at tey eldru, gomlu og sjúku standa fyri tørni. Tað er eisini hart tiltrongt. Hetta verður ein hin størsta avbjóðingin hjá komandi býráði.

Men tað er eisini ein bólkur millum børn og gomul.

Lat okkum í hesum førinum fokusera upp á ein ávísan bólk av ungum. Tey, sum eru komin upp um fólkaskúlaaldur, men ikki hava aldur til sokallaða øl-klubbalívið. Og sum kanska heldur ikki hava hug til slíkt. Bara at sleppa í býin at hugna og skemta sær,- uttan alkohol!

Fara vit aftur í 60- og 70-ini, so stóu allar dansidyr opnar. Har vóru m.a. Klubbin, Losjan og Sjónleikarhúsið. Har sluppu øll inn, uttan aldursmark.

Men so fingu vit afturlatnu klubbarnar, og eftir tað, nýggju rúsdrekkalógina, við sínum fyrimunum og so sanniliga eisini vansum, sum útihýsti teimum, sum vóru fyri teirri vanlagnu, at tey ikki vóru fylt 18 ár.

Teimum er lítið og einki fyri í dag, tá tað ræður um dansiviðurskifti.

Undirritaði var við til at fáa skipað Margarinfabrikkina. Politiska undirtøkan var so sum so at stuðla, men so kom norðurlendski Barnabati við tilboði um fíggjarligan stuðul fyrstu trý árini, soleiðis at ráð vóru at seta dagligan leiðara. Margarinfabrikkin hevur havt skiftandi umstøður, men er í dag sera vælvirkandi, til gleði og til gagns fyri mong.

Hetta er kortini ikki nóg mikið. Tað var alla tíðina ætlanin, at Margarinfabrikkin skuldi virka sum kveikjari til líknandi tiltøk víðahvar í býnum. Við Margarinfabrikkini sum miðdepil, skuldi kveikjast lív í líknandi virksemi í teimum ymisku útjaðarunum í býnum.

Hetta liggur á lani í dag, men tíðin er nú so avgjørt komin til at fáa upprunaliga ætlanina at virka.

At fáa í lag ungdómshús í teimum ymisku býarpørtunum, so ungdómur trívist í sínum dagliga umhvørvi.

Enn sum áður, vil eg fegin virka fyri hesum.

# Íløgur í framtíðina

**Bjørg Joensen**
*Valevni Javnaðarfloksins til Tórshavnar Býráð*




*Tórshavnar Kommunu eigur at gera fleiri íløgur í framtíðina og hevur ráð til tað. At skapa karmar um íløgufeløg, sum kunnu fara undir at byggja leigu- og lutaíbúðir er ein íløga. Ungdómshús, sum geva børnum og ungum tryggar umstøður í frítíðini, er onnur neyðug íløga.*

**Karmar til íløgufeløg**
At kommununi manglar bústaðir, ber boð um at fólk vilja búgva her. Tað er ikki ein kommunalur trupulleiki, men ein møguleiki til menning á økinum. At útvega sær bústað, skal verða eitt val, sum borgarar - alt eftir tørvi og førimuni - skulu hava í boði. Eg haldi, at kommunan skal arbeiða fyri at fáa landsins myndugleikar at skapa karmar um íløgufeløg, sum síðani kunnu standa fyri bygging av leigu- og lutaíbúðum. Á hendan hátt kemur privatur kapitalur í umferð og er við til at skapa loysnir á bústaðarøkinum, og skattapeningurin verður brúktur til tað, hann er tilætlaður - nevniliga góðar tænastur til borgaran.

**Ungdómshús**
Tað er umráðandi, at Tórshavnar Kommuna ger rættar íløgur, og tryggjar, at sum mest fæst burturúr hvørjari skattakrónu. Kommunan er skuldarfrí, skattaprosentið óbroytt og inntøkan støðug. Her er veruliga talan um møguleikar at raðfesta soleiðis, at tað kemur flestum borgarum til góðar. Eg vil arbeiða fyri, at kommunan byggir ungdómshús til børn/ung ávikavist á Hamarinum á Argjum, á Norðasta Horni, á Løgmannabreyt og í Kaldbak.

**Vit skulu hava álit á umsitingina**
Neyðugt er at skapa størri álit á umsitingina, so vit kenna okkum vís í, at allir borgarar eru líka fyri lógini. Átalir frá Løgtingsins Umboðsmanni og tey mongu byggimál, sum hava verið umrødd í fjølmiðlunum, hava ikki tænt umsitingini. Hetta er hvørki gott fyri starvsfólkini, býráðslimirnar ella borgararnar. Kannast má, um umsitingin hevur nóg góðar karmar at virka undir og hvørjar ábøtur skulu gerast, so álitið endureisist.

**Vit skulu tillaga kommununa eftir okkum, ikki øvugt.**


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Teresa Jensen teresa@sosialurin.fo
Hjørdis Gregersen hjordis@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Páll Holm Johannesen pall@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo
**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14⁰⁰



**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




## VIÐMERKINGAR

# Barnafamiljan má fáa lætta í barnaansingini

**Katrin Dahl Jakobsen**
*Valevni Javnaðarfloksins til Tórshavnar Býráð.*




Møtti eini ungari mammu í býnum. Leiðin gekk oman í spælistovuna í Meinigheitshúsinum. Við sær hevði hon dreingirnar báðar, annar í og hin sitandi á vogninum. Veðrið var av tí allar fagrasta. Hóast hon henda dagin heldur kundi hugsað sær at børnini hittust úti á einum spæliplássi, so var hon fegin um, at tað var eitt stað, hennara dreingir sóu onnur børn. Men hví ikki vøggustovu, vildi eg sum eitt býtt vita. Tvey vøggustovubørn, helt hon fyri- tað hevði kostað okkum 54.780 kr. árliga!!!! Sjálvsagt ber tað ikki til afturat húsaútreiðslum. Skilti á henni, at her var einki í at velja. Av tí at hon onga ansing hevur, og tí ikki er tøk á arbeiðsmarknaðinum, fær hon einki úr ALS. Almannastovan kann ikki hjálpa, tí hon hevur bæði børnini heima, og tískil hevur hon sjálv valt tað, halda tey. Frípláss fæst heldur ikki, tí maðurin fer eitt vet upp um markið, sum er 240.000 kr árliga. Hevði tað um ikki annað borið til at havt hálvdagspláss, uttan at betala fyri fullan dag. So, helt hon uppgevandi, so dýrt tað er at seta búgv í Havn, er sanna valið hús ella børn. Ikki bæði.

Hetta er bert eitt dømi ein tilvildarligan dag í býnum.

**Tíðin er búgvin**
Javnaðarflokkurin á tingi hevur koyrt undir at fáa aðrar flokkar at taka til sín tað neyðuga og skilagóða í at veita systkinaavslátt í barnaansingini. Í febr. 2002 løgdu Hans Pauli Strøm og Kristian Magnussen vegna flokkin fram uppskot um hetta, men hinir flokkarnir, Miðflokkurin undantikin, ella tíðin hevur helst ikki verið búgvin til tað. Men nú man hon vera tað, nú fleiri valevni úr øðrum flokkum taka hetta fram í teirra skriving, uttan tó at geva boð uppá, havt tað møguliga fer at kosta . Einki forðar eini kommunu í at seta hetta í verk. Lógin um dagstovnar og dagrøkt sigur, at foreldur í **mesta lagi** skulu gjalda 30% av rakstrarútreiðslunum. Einki verður sagt um í minsta lagi. Sostatt stendur tað kommununi frítt, í hvussu stóran mun hon vil stuðla, hevur hon fíggjarorku til tað. Og tað hevur Tórshavnar kommuna! Eg vildi mett, at um leisturin t.d varð fult gjald fyri fyrsta barnið og hálvt fyri restina, so hevði talan í mesta lagi verið uml. 3 mió. kr. Men sjálvt tá, hevði verið dýrt at havt tvey vøggustovupláss.

Herfrá og til at kunna samanbera okkum við grannalond sum t.d. Svøríki, sum við lóg hevur ásett í kr. og ikki %, hvat max. gjald kann vera, har systkinaavsláttur er í lagaliga ansingargjaldinum, har børn sleppa ókeypis frá august í tí árinum tey fylla fýra, o.s.v., o.s.v., er øgiliga langur vegur. Javnaðarflokkurin vil í holt við hesa leið.

# Skal sjálvræði framhaldandi máast undan kommununum?

**Eyðgunn Samuelsen**
*valevni Klaksvíkar býráð*
*heima.olivant.fo/~eydgunn*




Vanligt hevur verið seinastu árini, at løgtingi samtykkir broytingar, aloftast í samband við fíggjarlógina, ið skerjir inntøkurnar hjá kommununum. Samstundis hevur gongdin eisini verið tann at mál verða grýtt út til kommununar ið viðføra eykaútreiðslur.

Taka vit árini 2000-2004 so eru broytingar gjørdar sum fyri Klaksvíkar kommunu ein inntøkumiss á 10 milliónir krónur, enn um lógirnar vóru tær somu sum í 2000. Hetta merkir ein inntøkumiss á 40 milliónir í einum valskeiðið, júst helvtin av tí upphædd (80 milliónum) ið vit hava gjørt íløgur fyri hesi farnu 4 árini.

**Gongdin heldur fram !**
Tað sær ikki mætari út enn at henda samgongan ætlar at halda fram við at máa fíggjarliga støðið undan kommununum. Tann nógv umtalaði skattalættin viðførur at botnfrádrátturin skal hækkast við 2000 krónum hetta vil merkja ein inntøkumiss á 1,5 millión fyri Klaksvíkar kommunu. Ætlanin er eisini at samtykkja nýggja lóg um barnaforsorg ið inniber at kommununnar skulu fíggja hetta øki. Árliga útreiðslan til barnaforsorg í Klaksvík er 4 milliónir, hartil kemur at hetta er eitt øki við skjótt vaksandi útreiðslum ið ikki eru lættar at stýra. Kommununnar fáa loyvið at hækka skatin 0,9% fyri at fáa hesa meirútreiðslu innaftur og samstundis skal landið lækka skattin tilsvarandi. Hetta er bara ikki so einfalt sum tað ljóðar.

**Sjálvræði fánar !**
Heldur henda gongdin fram komandi árini so verður sjálvræði spakuliga máa undan okkum og alt tos um ræðið á egnum viðurskiftum verður uttan innihald. Ein áhugaverdur spurningur ið eg kundi hugsa mær at fingið svaraðan er, hvat sigur landsstýrismaðurin í innlendis- og kommunumálum ? er hetta í trá við politikkin hjá Fólkaflokkinum mótvegis kommununum ? tað hevði verið gott at vita nú krossurin skal setast til býráðsvalið 9 november !

Gott val.

# Byggigølur

**Egin Henriksen**
*valevni Miðfloksins til Tórshavnar býráð*




Er tú troyttur av byggigølum og eini býráðssamgongu, sum at kalla alt valskeiðið hevur ligið í stríð við sínar borgarar, í einum býlingi fyri og øðrum eftir, og sum uttan himpr broytir byggi-samtyktir, tá teir renna pannuna ímóti, fyri at fáa síni áhugamál ígjøgnum, so bjóða vit í Miðflokkinum okkum fram sum eitt frískt alternativ.

Fáa vit leiðsluna í tí nýggja býráðnum, fara vit at arbeiða hart fyri at fáa nøkur ting uppá pláss.

Allir borgarar í kommununi fáa sama virði og verða hoyrdir, óansæð hvat teir eita ella ikki eita, hvat teir eiga ella ikki eiga, hvar teir búgva ella ikki búgva.

Byggisamtyktir verða virdar og verða ikki toygdar fyri at røkja seráhugamálum.

Tú skal róliga kunna leggja teg til hvíldar um kvøldið uttan at óttast fyri, at kommunan fer avstað við økinum rundan um hús tíni morgunin eftir, ella at fríøkið í tínum grannalagi er selt onkrum hissini "spekulanti".

Við okkum til róðurs verður kommunan ikki nakað sjálvtøkuborð - nei, øll skulu fáa sama rætt, og vit fara at leggja doyðin á, at skipa soleiðis fyri, at øll kunnu liva í friði og náðum í kommununi.

Til síðst og ikki minst ætla vit at hava góð viðurskifti við Umboðsmannin.

*Trúgv - trygd - trivnaður*

X við lista H

Gott val

# Íbúðartrotið í Tórshavnar kommunu

**Halla Samuelsen**
*valevni hjá Javnaðarflokkinum*




Stórur mangul er á íbúðum í Tórshavnar Kommunu. Kommunan eigur at lata byggja íbúðir/kollegiir, so at fólk, ið ganga í skúla ella eru undir útbúgving, kunnu hava møguleika at eiga, ella leiga ein bústað. Eisini er stórur mangul á íbúðum til eldri fólk. Tað eru nógv eldri fólk, sum sita í alt ov stórum húsum, sum tey fegin vildu sloppið av við, um tey høvdu møguleika fyri at flyta inn í eina eigaraíbúð ella leigaða íbúð, um slíkar vóru til taks frá kommununi.

Kommunan eigur at lata byggja slíkar íbúðir/kollegiir, so tey kundu havt hendan møguleikan.

P.S. Við endan á Jákup Nolsøesgøtu standa rovini av einum betongbygningi, sum einaferð var ætlaður til íbúðir. Hesin er ongantíð blivin liðugur og stendur nú sum ein skomm fyri alt umhvørvið. Um kommunan keypti grundøkið har rovini standa, kundi hon lati byggja íbúðir/kollegiir har.

Javnaðarflokkurin er greiður yvir støðuna og vit ynskja at gera nakað við hetta, nevnliga at gera bústaðarmøguleikarnar betri.

Fái eg tín stuðul til Býraðsvalið 9. nov., ert tú við til at gera bústaðarmøguleikarnar betri. So skal eg gera mítt til at hetta mál verður loyst skjótt og væl.

# Kommunan fyri øll

**Jói Winther**
*Valevni hjá Javnaðarflokkinum í Tórshavnar kommunu*




Nú hevur hendan samgongan sitið í fýra ár, og nógv dagstovnapláss eru bygd, alt gott um tað. So eru karmarnir skaptir, og mugu teir útfyllast við kvalifiseraðum fólki. Eingin hevði sent eitt skip avstað, uttan at menn vóru bæði á brúgv, maskinu og dekki. Hetta verður ikki tonkt um hjá býráðssamgonguni, og halda tey helst væl til standa. Vit vera noydd at loysa hendan trupuleika sum skjótast, í samráð við yrkisfeløgunum hjá avvarðandi stovnsfólki. Tað má ikki sum nú, bara teinkjast uppá at byggja stovnar, men vit mugu skapa karmar og fjálga um vinnulívið, so at nýggj arbeiðspláss koma sum fylgja av einari miðvísari planlegging.

Eg vil hjálpa við hesum. Gott val.